UTTAN ÚR HEIMI

## Hamas til Noregs

Tað hevur vakt ans í Noregi, at embætismenn skulu hitta tveir umboðsmenn hjá Hamas, sum koma til Noregs í næsta mánað eftir innbjóðing frá Palestinanevndini í Oslo.

Uttanríkisráðið hevur gjørt av, at nakrir embætismenn skulu tosa við teir báðar Hamas-umboðsmenninar. Tað hevur fingið øði í Framburðsflokkin, men Jonas Gahr Støre, uttanríkisráðharri, sigur við Dagsavisen, at samskifti er tann besti hátturin at loysa kreppuna í Miðeystri. Hin møguleikin er kríggj, sigur hann. Hann vísir samstundis á, at teir palestinsku umboðsmenninir sleppa ikki at tosa við norskar ráðharrar, men bara embætismenn.

– Vit eiga at nýta høvi til at lurta eftir teirra sjónarmiðum og at greiða teimum frá okkara, sigur Jonas Gahr Støre.

## Flóttafólk í rættinum

Myndugleikarnir í Kuba hava stevnt sjey kvinnum, sum royndu at flýggja av landinum.

Kvinnurnar høvdu fleiri børn við sær, tá tær royndu at flýggja, og myndugleikarnir hava nú ákært tær fyri at hava sett lívið hjá børnunum í vanda, tá tær fóru ígjøgnum eitt mýrulendi út til strondina. Nakrir mannasmuglarar hjálptu kvinnunum og børnunum, men tann 5. apríl vórðu tey avdúkað og tikin í Pinar del Rio har vesturi í landinum, skrivar AP. Eitt fólk doyði, og tvey vórðu særd, tá tey royndu at seta seg upp ímóti myndugleikunum.

Kubanska blaðið Gamma skrivaði í gjár, at kvinnurnar høvdu sjey børn við sær, og at tað yngsta var bara ársgamalt. Sambært blaðnum fingu børnini hvørki vátt ella turt í fleiri dagar, tá kvinnurnar royndu at flýggja við teimum.

## Fáa atgongd til gomul skjøl

Týski løgmálaráðharrin, Brigitte Zypries, boðaði í gjár frá, at innan seks mánaðir fær almenningurin atgongd til skjøl, ið snúgva seg um lagnuna hjá umleið 17 milliónum jødum og øðrum undir seinna heimsbardaga.

Skjølini, sum eru millum 30 og 50 milliónir í tali, hava ligið í einari goymslu í býnum Bad Arolsen. Fleiri lond, teirra millum USA, hava leingi kravt at fáa atgongd til skjølini, men ikki fyrr enn nú hava týskir myndugleikar valt at slaka. Sambært Brigitte Zypries hava Frakland og Pólland virkað sum semingslond í stríðnum um skjølini.

Í fyrsta umfari eru tað tó bara søgufrøðingar og avvarðandi hjá fólki, sum vóru í týskum týningar- ella arbeiðslegum, sum sleppa at hyggja í skjølini. Hóast skjølini hava verið loynilig, hava týsku myndugleikarnir loyvt altjóða Reyða Krossi at hyggja í tey, tá felagsskapurin hevur sóknast eftir upplýsingum um fólk, sum vóru í teimum nazistisku týningar- ella arbeiðslegunum.

## Vilja ikki gjalda

Eftir einari semju skuldi amerikanska tubbaksverksmiðjan R. J. Reynolds rinda statunum í USA næstan 10 milliardir krónur í endurgjaldi í fjør, men nú vísir tað seg, at fyritøkan hevur bara goldið eina góða helvt av pengunum. Hinvegin hevur tann størsta verksmiðjan, Philip Morris, goldið tær 20 milliardir krónurnar, sum fyritøkan bant seg til at gjalda.

Men bæði R. J. Reynolds og Philip Morris halda, at endurgjaldið er alt ov stórt. Tí hevur tann fyrra gjørt av at halda einum parti av pengunum aftur, og tann seinna hóttir við at fara í rættin við kravi um minni endurgjald.

Fleiri statir hava boðað frá, at teir ætla sær at gera sínar egnu semjur við tubbaksverksmiðjurnar, um málið hjá Philip Morris endar í rættinum.





*Hu Jintao og konan, Liu Yongqing, á veg úr flogfarinum, tá tey komu til Seattle at tosa við Bill Gates*

*Mynd: Reuters*

# Fyrst Gates so Bush

**Kinesiski forsetin fór at vitja Bill Gates, áðrenn hann fór at vitja George W. Bush**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá kinesiski forsetin, Hu Jintao, kom til Washington í dag, hevði hann longu verið á amerikanska statinum, sum ber sama navn sum høvuðsstaðurin. Í Seattle hevði hann hitt ríkmannin og Microsoft-stovnaran Bill Gates. Vitjanin var ikki ein roynd at niðra Bush, men heldur ein staðfesting av, at kinesisku myndugleikarnir eru farnir í hernað ímóti teirri stóru privatkopieringini í landinum, og sum hevur kostað Microsoft ovurhonds nógvar pengar, skrivar AP.

Tað er tí lítið at ivast í, at Hu Jintao fekk eina góða móttøku í Seattle, men tað verður øðrvísi í Washington. Amerikanska stjórnin vil hava betri javnvág í samhandilin ímillum tey bæði londini, tí sum hevur Kina 1200 milliardir krónur í avlopi um árið í handlinum við USA.

Eitt annað evnið, sum stendur á dagsskránni hjá Bush og Hu Jintao er Taiwan, men hildið verður, at spurningurin um kjarnorkuvápnaætlanina hjá Iran fer at fáa støri rúmd. USA fær ikki undirtøku fyri tiltøkum ímóti Iran, og júst Kina er eitt av londunum, sum er ímóti at revsa iranar. Bush hevur kortini gjørt greitt, at hann er til reiðar at troyta allar møguleikar, eisini hernaðarligt álop um neyðugt.

# Noreg ger kvetti av oljuprísinum

**Men norðmenn gjalda dýrt fyri tann góða prísin**

NOREG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Síðani annan páskadag hevur oljuprísurin verið oman fyri 70 dollarar fyri tunnuna, og tað kemur einum oljulandi sum Noregi væl við. Í fíggjarlógini hevur norska stjórnin roknað við, at oljuprísurin fer at liggja um 350 norskar krónur fyri tunnuna í ár, men nú gevur hvør tunna 100 krónur meiri, enn stjórnin hevði væntað. Tað merkir, at ríkiskassin fær einar 50 milliardir krónur meiri í ár, enn roknað varð við, tá fíggjarlógin bleiv gjørd.

Men tann vanligi norðmaðurin fær ikki stóra gleði av tí góða oljuprísinum, heldur tvørturímóti, skrivar Aftenposten. Arnstein O. Wigestrand, marknaðarserfrøðingur, sigur við blaðið, at norskir bileigarar mugu rokna við, at bensinið fer at kosta 12 krónur fyri liturin, men at tað kann gerast uppaftur dýrari.

– Verður kríggj við Iran, kann oljuprísurin fara upp í 120 dollarar, og so fer bensinprísurin í Noregi upp í 15 krónur, sigur Arnstein O. Wigestrand við blaðið.